# Um hví vit ringmerkja fugl








Fyri at útvega vitan um hvussu **fuglur flytur,** og hvussu **støðufastur** hann er.

Fyri at útvega vitan um hvussu **gamlir** fuglar verða, og hvørjum teir **doyggja av.**

Fyri at kortleggja hvussu hann flytur millum, **har hann eigur,** og hvar hann heldur til **um veturin.**

Fyri at fylgja við hvussu gongdin er viðvíkjandi **avkomi.** Góð ella ring ár.

Fyri at útvega okkum vitan um hvussu fuglur **velur sær livistað,** hvussu vítt teirra **liviøki** er, og hvussu teir **búleikast innanhýsis.**

Fyri at fylgja við hvussu **broytingar** fara fram í útbreiðsluøki hjá hvørjum fuglaslagi.

Fyri at lýsa bygnað, hamskifti og landafrøðiligt **fjølbroytni.**

Fyri at kunna **fyribyrgja** at stovnar koma í kreppu og enda við at hvørva.

Fyri at kunna breiða út **nýggja vitan** frá fuglaheiminum.

Tí at ringmerking er **ódýrur** og **eirindarsamur** háttur at útvega vitan til nýtslu í gransking og umsiting av fuglum í Føroyum.

